# Hvat er endamálið við føroyskum ungdómsfótbólti?

ANNFINN DANIELSEN
Ungdómsvenjari hjá MB



Viðmerkingar til fótbóltin fyri børn, nú fundur verður við feløgini í januar um ungdómsfótbóltin.

Til stuttleika og fyri at gera ein samanburð, setið eg her niðanfyri tey fremstu málini í donsku ungdómsfótbólti, og eru tey hesu, leysliga umsett:

• Fótbóltur fyri øll
• Fótbóltur fyri Danmørk
• Fótbóltur er felagslív
• Fótbóltur er trivnaður og savnar allar ættarbólkar
• Fótbóltur er persónlig menning og framsýning
• Fótbóltur er at læra
• Fótbóltur er spæl
• Fótbóltur er kapping
• Fótbóltur er handil og undirhald
• Fótbóltur hevur síni áhugamál

**Føroyskum fótbóltur partur av okkara mentan**

Spyrja vit eftir í Føroyum hvønn veg í fótbólturin fer, so er onki skrivað skjal, sum kann bera okkum á mál. Her er onki, sum sigur okkum um tað, at savnað fótbóltin í nøkur størri feløg, ella um fótbólturin er til fyri landsliðið, ella hvussu við áhugaverdari kapping fyri a, b og c liðini ? Hvat verður gjørt fyri at sameina mentan og fótbólt, t.d. at enda kappingina, áðrenn heysti kemur fyri ella um páskini og summarið ?

**Bert hugsa um landsliðsarbeiði**

Um eg ikki fari skeivur, vil eg meta at øll landskappingin hevur bert eitt endamál, og tað er, at hon skal verða so long sum gjørligt, fyri landsliðið skuld, og fyri at skipa úttøku av landsliðnum, og so at handa steyp og heiðursmerkju, tá kappingarnar enda einaferð í oktobur. Men skal hetta verða máli, og bara hetta? Skal føroyskur ungdómsfótbóltur bert umfata: 1. Fótbóltur fyri Føroyar og 2. Fótbóltur er kapping, herundir handan av steypum og heiðursmerkjum, og tað er so tað?

**Sakni breiðari mál**

Um hetta er so, so vil eg meta, at vit eru eftirbátur á mongum økjum, kanska burtursæð frá útbúgving av venjarum og leiðarum, sum tey mongu seinastu árini, síðani 1984, hava vunnið frama. Gaman í er hetta týdningarmikil táttur í spælinum, men eg sakni kortini nøkur breiðari mál. Kanska tey eru har, men so eru tey ikki fest á blað og almannakunngjørd, so einhvør kann lesa tey.

Hesu evni kundi verið tikin upp úti í feløgunum, sum partur av orðaskiftinum um mál við fótbóltinum, og at kunna foreldrini um felagsins politikk m.a. á hesum økjum:

- Um kostvanar
- Royking
- Rúsdrekkapolitikk
- Pædofili
- Leikaraskifti

Um leikaraskiftini eru at siga, at hesu átti at verið gjørd millum feløgini, og ikki frá felag til leikara ella foreldur, men altíð til núverandi felagi. Tað er jú ikki vist at leikararnir mennast í einum stórfelagið – tvørturímóti kann hann mennast væl í tí minni felagnum. Eitt sum manglar í, er at tryggja spælaranum møguleikan, um hann ikki trívist í nýggja felagnum. Honum átti at verið tryggjað, at kunna koma aftur til heimliga felagið, ístaðin fyri at hann purasta støðgar upp við fótbóltinum.

**Tríggjar skiftisleikarar, sum verða innskiftir**

Eitt, sum kundi haft áhuga, at umrøtt, er um heili 5 mans skulu sita eykamenn á einum liðið (12 ár og eldri). Hetta verður ofta til at leikarar, í stóran mun gerast áskoðarar ístaðin. Teir læra best við at spæla. Hetta kundi verið gjørt soleiðis, at ein kundi haft 3 skiftisleikarar ístaðin, og so vítt møguligt skuldi hesir verið nýttir helvtina av dystinum.

**Allir piltar og smápiltar fáa ein hálvleik**

Fyri leikarar, sum spæla í piltum og smápiltum (spæla ikki um FM), her átti tað verið soleiðis, at leikararnir skulu spæla minst helvtina av dystinum.

Hetta er eisini í tí andanum: "Fótbóltur fyri øll" og "fótbóltur er eitt spæl" og tá ein kundi hugsa sær, at tað ikki verður spælt um FM í hesum aldursbólkum, so hevði hetta verið ein sjálvfylgja.

**Fair Play**

Her átti at verið gjørt soleiðis, tá liðini byrja, at stillað verður upp á miðjuni. Útiliðið Fer fyrst til dómara og heimaliðið og heilsar. So ger heimaliðið tað sama. Sama verður gjørt, tá dysturin er liðugur.

So hevði spælið liva upp til tað, vit forvænta av leikinum.

---

# Mediernes sejr over Israel

JØRN NIELSEN
Næstved

**Den nye stats ønske var at forvandle ørkenen til en fredfyldt oase**

"Du må ikke forbande det folk, for det er velsignet!" (4. Mos. 22:12)

I Oslo har der netop været en demonstration til støtte for Israel. Den førte til voldelige optøjer af Israels fjender i en størrelsesorden, som hidtil ikke har været set i nyere tid. Politiopbudet var da også stort., og luften gennemtrængtes af tåregas.

Der har også lige, stadig i Oslo, været en kæmpedemonstration til støtte for palæstinenserne. Her foregik alt påfaldende roligt og stille. Ingen jøder ville nedværdige sig til nogen optøjer. Dette taler for sig selv.

Har Israel da ikke begået et overgreb? Jo, men på hvilken baggrund? Der findes ingen "ren" krig, og det bliver ikke bedre af, at Hamas i den aktuelle situation bruger en værgeløs civilbefolkning som levende skjold og ellers fejt beskytter sig selv i underjordiske tunneller, medens kvinder og børn blotlægges. Israels forsvarskrig er betydeligt "renere" end vore venners, de Allieredes, tæmpebombning i febr. 1945 af Dresden - en af Europas smukkeste kulturbyer, som på det tidspunkt ingen militær betydning havde. Alligevel omkom 10.000´er af civile i de flammende ruiner. (Den historie pinte senere selv en mand som Churchill

Men Israel er skurken. Kun et fåtal af mit historieløse folk véd ret meget om hverken 1948 eller 1967 (seksdageskrigen). I bedste fald overdøves historien af en anti-semitisk, vellykket propaganda, som der også skændigt gives plads til i vore medier. Lad mig minde om nogle grundlæggende historiske facts, som burde være en del af vor børnelærdom og forklarer, hvorfor jeg anser det for min simple pligt at forsvare Israels ret til at være til og om nødvendigt at bide fra sig.

Da Israel ved FN-resolution i november 1947 på fuld lovlig vis fik tildelt en bid land på størrelse med Jylland (i øvrigt kun en brøkdel af det, englænderne oprindelig havde stillet dem i udsigt), hvoraf en stor del var ørken- og sumpeterræn, som ingen tog alvorligt notits af, var det ikke med nogen terroristisk hærgen af naboer for øje. Energien skulle bruges til at opdyrke det nye land og få ørkenen til at blomstre, og ønsket var helt klart at leve i fred og gøre det tildelte hjemsted for jøder verden over så indbydende som muligt. Alligevel anklages Israel nu for nærmest nazi-lignende folkemord og imperialisme.

Men hvad skete, da Israel så dagens lys i 1948? Fra dag 1, mens babystaten endnu lå i sin vugge, gik naboerne til angreb og den såkaldte uafhængighedskrig var en kendsgerning. Det turde være indlysende, hvem der var den krænkede part, og hvem der hærgede hvem. Og sådan fortsatte krænkelserne år for år op til vor tid. 1967 var et nøgleår, da Israel på seks dage ikke bare slog de angribende hære tilbage, men erobrede nye områder og af sikkerhedshensyn reviderede grænsedragningerne, som iøvrigt sker i enhver krig, hvor den angrebne part går af med sejren. Jfr. ændringen af Tysklands landkort, da det som aggressoren måtte finde sig i at afstå land til fx Polen, som ingen nogensinde senere har vovet at kalde "besættelsesmagt".

Nogle vil hævde, at det var Israel, som begyndte nævnte 6-dages krig, men det er ikke sandt. Lukningen af Tiran-strædet forinden var allerede en krigserklæring. De opmarcherede fjendtlige hære stod på spring, og på et hængende hår kom Israel Nassser i forkøbet og lammede hans luftflåde, som stod parat til at sønderbombe Israel.

Både 1948 og 1967 ligger i dag mange år tilbage i tiden, men intet nogenlunde oplyst menneske kan bruge det som undskyldning for ikke at vide besked om den historiske baggrund for både jødehadet i nyere tid og den jødiske stats nødvendige forsvarspolitik. Det gøres gældende, at Israels militærapparat financieres af USA, men er det en forbrydelse? USA valgte side og gjorde det på et retfærdigt grundlag. Selv ser jeg det som min nationale pligt at gøre det samme.

Den nuværende konflikt er, hvor hjerteskærende urimeligt det end lyder, i Hamas´ interesse. Når Israel trækker sig tilbage vil Hamas blive hyldet som "sejrsherren" (læs: mediekrigens sejrherre) med endnu mere demagogisk grund til at kunne sige til alverden: "Se, hvad jøderne har gjort!" Og dermed puste endnu mere til flammerne i det anti-semitiske bål, som hærger vor del af verden, og Israel vil igen blive sorteper.

Det vil jeg også blive. For det første fordi der ikke vil blive lyttet til selve historien. Og for det andet fordi opinionen har valgt at tro løgnen. Goebbels havde ret i sin påstand om, at fortæller du en løgn tilstrækkeligt mange gange, vil den blive troet. Men sandheden (med stort S!) vil alligevel til sidst sejre.

---

# Sofus rindaði listasavnið á Sandi sjálvur

Í grein okkara um støðuna hjá Sands Kommunu í sambandi við nýggja Listasavnið og nýggja bókasavnið á Sandi í Sosialinum í farnu viku, eru nøkur viðurskifti, sum eiga at verða nágreinað. Tað var ikki Sands kommuna, sum bygdi Listasavnið á Sandi. Tað var gávumildi gevarin sjálvur, Sofus Olsen, sum læt listasavnið byggja og talan er um ein sjálvsognarstovn. Sofus Olsen skrivaði at kalla allar sínar ognir og øll síni listaverk til savnið. Hinvegin hevur kommunan átikið sær at rinda fyri raksturin. Mentamálaráðið læt góðar 200.000 krónur í stuðuli til ætlanina og tað sama gjørdi Sands Kommuna.